# Samtyktir fyri Sörvágs Bygdarsavn

1.

Navn savnsins er Sörvágs Bygdarsavn.

2.

Endamál savnsins er at goyma og sýna fram savnsgripir o.a., ið kann lýsa bygdamenningina og bygdarsöguna í hóskandi höli. Til hetta arbeiðið fær savnið stuðul frá Sörvágs Bygdarsavnsfelag og frá Sörvágs Bygdarráð. Sörvágs Bygdarsavn er undir eftirliti Föroya Fornminnissavns.

3.

Sörvágs Bygdarsavn er sjálveigandi stovnur fíggjaður av limagjaldi goldið til Sörvágs Bygdarsavnsfelag, av almennum studningi o.ö.. Stovnurin verður stýrdur av eini 5 mannanevnd. 4 nevndarlimir verða valdir av Sörvágs Bygdarsavnsfelag og 1 av Sörvágs Bygdarráð. Nevndarlimirnir verða valdir fyri 2 ár í senn. Sörvágs Bygdarsavnsfelag velur sínar limir á aðalfundi, meðan bygdarráðið velur sínar sum skjótast aftan á aðalfundin. Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni.

4.

Skrivarin verður vældur av nevndini

5.

Roknskapin hjá savninum hevur ein av nevndarlimunum.
Roknskaparárið er álmanakkaárið.

/.

Nevndin setur eitt fólk til at taka sær av dagligu umsiting og dagligu leiðsluni av savninum og avger, hvussu hetta fólk skal lönast. Setanin av hesum fólki skal góðkennast av Föroya Fornminnissavni.

8.

Nevndin fyri Sörvágs Bygdarsavn kann broyta samtyktir savnsins í samráð við Sörvágs Bygdarsavnsfelag, Sörvágs Bygdarráð og Föroya Fornminnissavn.

9.

Um Sörvágs Bygdarsavn verður avtikið, so fella ognir tess til Föroya Fornminnissavn.

Soleiðis samtykt á stovnandi fundi í Sörvági tann 26/03 1988

Góðkent av FØROYA FORNMINNISSAVNI

Hoyvík, 20. januar 1989

Símun V. Arge

settur landsantikvarur

Góðkent av Føroya Landsstýri, 20. mars 1989.

landsstýrismaður

viðv. F.L. j. nr. 2204-14-11